*Tórunn Karina Henriksen*

# Kærleikans longsul

Dora situr og hyggur út ígjøgnum vindeygað á café *Kringluni*. Tað er ein vanligur, gráur heystdagur, og kortini er hesin dagurin ikki ein púra vanligur dagur hjá Doru. Hon hevur glett seg nógv til hendan dagin. Tað er í dag, at hon skal hitta barndómsvinin, Hera, sum hon hevur kent síðan hon var 5 ára gomul. Hann hevur arbeitt eitt heilt ár í USA. Tað er so nógv, hon vil spyrja hann um. Hon hevur altíð havt stóran áhuga fyri USA og gleðir seg til at hoyra, hvat Heri hevur upplivað. Hon hyggur at klokkuni, um 5 minuttir skuldi hann komið. Altíð møtir hon í so stundisliga. Hon hevur arbeitt í einum mótahandli mitt í býnum, síðan hon bleiv student síðsta summar. Og hon trívist væl. Tað er bara, sum um okkurt manglar…

Heri hevði ljóðað so glaður í telefonini. Dora brosar fyri seg sjálva, meðan hon rættar uppá sítt myrka, langa hár.

Og áðrenn Dora varnast tað, stendur Heri við diskin og hyggur runt í caféini. *Heri*, høgur, klænur og ljóshærdur. Eygu teirra møtast, og Dora smílist og veittrar til hansara. Hann smílist til hennara. Dora leggur merki til, at hann er vorðin sólbrendur.

”Hey!” sigur hann og gevur henni eitt klemm.

”Tað er gott at síggja teg,” sigur Dora brosandi.

”Tú sært gott út”.

”Takk,” svarar Heri.

”Tað gert tú eisini,” sigur hann, meðan hann hyggur at hennara blíða andliti og hennara brúnu eygum.

Tey biðja um tveir koppar av kaffi og fara at tosa um farna árið.

”Fortel mær alt um lívið hjá tær í USA,” heldur Dora fyri.

Heri brosar og fortelur, at lívið í USA var heilt fantastiskt. Hann hevur arbeitt sum tænari á einari matstovu í Los Angeles og møtt nógvum spennandi fólkum.

”Eg havi eisini roynt at surfa. Strondin í California er heilt super”.

Tað er tað, sum hann hevur gjørt í frítíðini, sum hugtekur Doru mest. Hon hevur ferðast so lítið sjálv og gerst eitt sindur øvundsjúk, tá Heri fer at fortelja um pálmarnar í Los Angeles og um, hvussu vakurt har var.

”Vart tú við Hollywood-skeltið, og sást tú nakrar filmstjørnur?” spyr Dora og kennir, at hon rodnar eitt sindur.

Heri fortelur, at hann hevur vitjað eitt filmstudio í Hollywood og sæð Clint Eastwood á gøtuni í L.A.

Soleiðis tosa tey leingi um USA. Dora hyggur ikki at klokkuni. Tað ger hon ongantíð, tá hon er saman við Hera.

”Eg møtti einari amerikanskari gentu haryviri. Hon eitur Sandy,” sigur Heri.

”Hon arbeiddi sum uppvaskari á matstovuni”.

Dora fær ilt í búkin av hesum upplýsinginum. Hon hevur altíð verið góð við Hera, og meðan hann hevur verið burtur, hevur hon ásannað, at hon vil vera meira enn vinur hansara.

Heri fortelur glaður um ta amerikonsku gentuna.

”Hon kemur til Føroyar í næsta mánað at vitja meg”.

Dora veit ikki, hvat hon skal siga. Hon hevur longst so illa eftir honum, glett seg so nógv til at síggja hann aftur, at hon kennir seg heilt tóma, nú hon fær at vita, at ein onnur genta er í lívinum hjá honum. Hon og Heri hava altíð fylgst, og hon hevði vónað, at hann hevði tær somu kenslurnar fyri henni, sum hon hevur fyri honum.

Hon roynir alt hon kann at dylja, hvussu vónbrotin hon er, men hon ristist á hondunum, meðan hon drekkur av kaffinum.

”Tað verður stuttligt hjá tykkum,” sigur hon fálig og hyggur út gjøgnum vindeygað. Nú er tað farið at regna.

”Tú skalt hitta hana. Eg vóni, at vit trý fara at hava tað stuttligt saman,” sigur Heri.

”Ja, tað vóni eg eisini,” sigur Dora og hyggur niður.

Tey tosa um, hvat Dora tekst við fyri tíðina.

”Næsta ár ætli eg mær at søkja inn sum sjúkrasystir,” sigur hon.

”Ja, tær hevur altíð dámað væl at taka tær av øðrum, so tað er sikkurt júst nakað fyri teg. Hvør veit, hvar eg endi,” sigur Heri lætt.

Dora hyggur at hansara glaða andliti og ljósa hárinum. Hann hevur altíð havt eitt lætt og opið sinnalag, og tað er tað henni dámar so væl við honum.

Dora smílist til hansara. Hann tekur knappliga í hondina á henni, og Dora gerst eitt sindur kløkk.

”Eg havi saknað teg nógv, meðan eg var burtur.”

”Eg havi eisini saknað teg,” svarar Dora og hyggur niður. Heri sleppur hondini á henni og hyggur at klokkuni.

”Eg havi ein avtalu við mammu mína,” sigur hann og drekkur tann síðsta sopan av kaffinum. ”Skulu vit fara?” spyr hann í einum lættum tónafalli.

Dora nikkar og letur seg í jakkan.

Tá tey standa úti á gøtuni klemmar Heri hana farvæl.

”Vit síggjast! Eg ringi til tín onkuntíð,” sigur hann og smílist til hennara.

”Ja,” svarar Dora. Tey skulu hvør til sítt.

Dora kennir seg so einsamalla, tá hon gongur heim í regninum. Hon hevði glett seg so nógv til at síggja hann, og nú hugsar hon bara hesa Sandy. Dora ímyndir sær eina sólbrenda, amerikanska gentu og kennir seg knappliga tóma og bleika.

Tá hon snarar lykilin í hurðini til íbúðina, verður hon móttikin av frensinum, sum glaður leypur ímóti henni. Dora kínur frensinum, meðan hon hugsar um møtið við Hera.

Onki bleiv soleiðis, sum hon hevði ímyndað sær tað. Hon og Heri vóru bæði 20 ára gomul, og tað var nú tey vóru ung, at hon vildi vera saman við honum.

Nær var tað hon hevði funnið útav, at hon var forelskað í Hera? Tað mundi vera, meðan hann var í USA. Aldri hevði hon trúð, at hon fór at sakna hann so nógv, sum hon hevði gjørt, men nú eftir at hon hevur hoyrt um Sandy kennir hon seg heilt hjálparleysa.

"Og nú skal Sandy enntá koma til Føroyar, og Heri vil, at eg skal hitta hasa amerikonsku "dulluna," hugsar Dora ilskliga, meðan hon ristir við høvdinum. So fer hon yvir til steroanleggið og koyrir eitt gott lag á.

....

Hjá Doru gongur lívið sína vanligu gongd. Hon arbeiðir í mótahandlinum og dámar væl at selja klæðir. Viðhvørt er hon saman við vinkonunum, men hon sigur teimum ikki, hvussu nógv Heri er komin at týða fyri hana. Tríggjar vikur eru lidnar, síðani Dora hitti Hera á caféini, og hon hevur ikki hoyrt frá honum síðani. Hann býr í hinum endanum av býnum.

Dora hugsar nógv um Hera og vónar, at hann skjótt fer at ringja til hana.

Og so ein dagin síðst í november ringir telefonin. Tað er Heri.

"Takk fyri seinast," sigur hann glaður.

"Tað var hugnaligt at tosa við teg aftur".

"Somuleiðis," svarar Dora og fær ilt í búkin av spenningi.

Heri spyr, hvussu tað gongur hjá henni.

"Jú, takk tað gongur fínt," svarar Dora og kennir onkursvegna, at hon lýgur.

Hon spyr varisliga, nær Sandy kemur til Føroyar at vitja. Hon bíðar bangin eftir, hvat Heri fer at svara.

"Sandy kemur ikki til Føroyar kortini," svarar Heri róliga. "Hon hevur so nógv at gera á universitetinum," sigur hann og fortelur, at Sandy er farin at lesa til lækna.

Dora er púrasta á gosi. Hon veit ikki, hvat hon skal siga, men hon veit, at hon nú hevur ein kjans.

"Skulu vit ikki hittast aftur okkurt kvøldið?" heldur Dora varisliga fyri, "fara í biograf kanska?".

"Jú, tað hevði verið stuttligt" svarar Heri.

"Hvørjum filmi skulu vit hyggja at?" spyr Dora.

""Spiderman 3" skuldi verið góður, skulu vit ikki fara at hyggja at honum?"

"Jú," svarar Dora glað.

"Hann gongur klokkan 8 leygarkvøldið".

"So hittast vit við billetlúkuna," sigur Dora.

"Alt í lagi. Vit síggjast. Bei." sigur Heri.

"Bei," svarar Dora stillisliga.

Dora er um at bresta, tá hon leggur rørið á.

Hon fær næstan ikki bíða til leygarkvøldið og finnur sær ein smarta troyggju í handlinum. Hana skal hon í, tá hon fer út við Hera.

...

Tey hittast við billetlúkuna. Heri keypir billettirnar, og tey tosa saman, áðrenn filmurin byrjar. Dora er glað fyri at síggja hann aftur og gevur armi hansara eitt klemm. Hann sær gott út. Hon vil fegin vita meira um Sandy, men hon torir ikki at spyrja hann meira um ta amerikonsku gentuna.

Tey hava eitt hugnaligt kvøld, og aftaná filmin fylgir Heri henni heim

...

Tíðin gongur. Nú vera skjótt jól, og Dora gleðir seg til høgtíðina, sum stendur fyri framman. Hon hevur verið nógv saman við Hera í seinastuni. Endiliga eru tey vorðin par. Dora brosar fyri seg sjálva, meðan hon hugsar um hvørja jólagávu, hon skal keypa Hera. Tey eru blivin samd um at geva hvørjum øðrum jólagávur. Sandy er ongantíð komin uppá tal aftur, onkursvegna vil Dora ikki spyrja, og Heri nevnir hana ikki. Dora er bara fegin um, at hon nú hevur Hera fyri seg sjálva, hon vil ikki rippa upp í fortiðini.

Jólaaftan heldur Dora jól saman við foreldrum og systkjum. Hon fær næstan ikki bíða við at lata gávuna frá Hera upp. Tað er ein lítil gáva. Hendurnar á Doru ristast, tá hon pakkar gávuna út. Tað er ein vøkur hálsketa. Dora fær at vita, at hon er keypt í USA, tá hon takkar Hera fyri tí vøkru gávuna.

”So hugsaði tú altso um meg, meðan tú vart burtur?” spyr Dora eitt sindur foy.

”Ja, sjálvandi!” svarar Heri glaður.

”Men hvat við Sandy?” gleppur burturúr Doru.

”Tað er onki millum Sandy og meg. Tað hevur tað ongatíð verið,“ svarar Heri róliga.

Dora veit ikki, hvat hon skal siga, eitt sindur býtta kann hon ikki lata vera við at kenna seg. Øll handan órógvin av púra ongum.

Tað er 3. jóladagur, og hon og Heri sita aftur á *Kringluni*.

Heri tekur í hondina á henni.

”Tað er teg, eg eri góður við, tað havi eg altíð verið,” sigur hann álvarsliga.

Og Dora kann ikki lata vera við at smílast aftur til hansara.

© Tórunn K. Henriksen 2008. All rights reserved.

*Tað er strangliga banna at nýta tekstin, ella partar av honum, uttan at høvundan loyvi.*